gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Barnaheimið tekur ikki ímóti smábørnum

*Einasta barnaheimið í vesturheiminum, Føroya Barnaheim, sum hevur virkað í hálvt hundrað ár, tekur ikki ímóti smábørnum um nakrar fáar vikur.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



**Fyri fyrstu ferð kunnu smábørn ikki koma á Barnaheimið. Ikki tí, at eingin tørvur er á Barnaheiminum, men tí at barnaverndir velja fosturfamiljur fram um Barnaheimið. - Barnaverndirnar, sum hava ábyrgdina av skilinum, mugu finna aðrar loysnir fyri børn, ið hava brúk fyri hjálp, sigur Mirjam Johannesen, virkandi leiðari á Barnaheiminum**

BARNALÍV
*Turið Kjølbro*

Um nakrar vikur letur smábarnadeildin á Føroya Barnaheimi aftur. Ikki tí, at tað er betri at vera barn í Føroyum, men sum eitt úrslit av miðvísa arbeiðnum hjá barnaverndum kring landið, sum heldur senda børn í fosturfamiljur enn á barnaheimið.

Í løtuni eru fýra børn á Barnaheiminum, og øll eru á deildini fyri størri børn. Nú smábarnadeildin letur aftur, mugu seks starvsfólk sigast úr starvi og onnur setast í niðursetta tíð. Hetta eru øll dugnalig og væl skúlað fólk, sum hvør á sínum øki hava fingið serútbúgving innan økið.

- Hetta er ógvuliga harmiligt og í grundini ein ræðulig støða at vera í. Einasta barnaheimið í vesturheiminum, sum ikki tekur ímóti smábørnum. Allur serkunnleikin, sum er bygdur upp og sum hevur kostað samfelagnum nógvar pengar, fer nú fyri skjeyti. Ikki tí, at tað ikki er brúk fyri honum, men tí hann ikki verður brúktur, sigur Mirjam Johannesen, virkandi leiðari á Barnaheiminum.

Hyggja vit í bløðini, síggja við hópin av lýsingum, har lýst verður eftir fosturfamiljum. Alt gott um fosturfamiljur, sum í flestu førum kýta seg til uppgávuna. Nógvar virka væl og børnini fáa tað gott. Men í heilt nógvum førum tørvar barninum, sum hevur verið fyri vantandi umsorgan alt lívið, viðgerð av fakfólki. Fosturfamiljurnar eru ikki útbúnar til uppgávuna og duga tískil ikki at skyna á, hvønn tørv barnið hevur, tey hava fingið til fosturs. Á Barnaheiminum var eisini pláss fyri familjum, sum kundu koma til eygleiðingar og vegleiðingar, men tann møguleikin er ikki longur.

- Sum fakfólk byggja vit børn, sum hava verið úti fyri líkum og ólíkum, uppaftur, læra tey at stóla uppá vaksin fólk aftur og at knýta seg til onnur. Uttan hesa viðgerðina eru børnini ikki før fyri at taka ímóti nærveruni, sum ein fosturfamilja kann geva teimum. Vit arbeiða eisini við at finna skikkaðar fosturfamiljur, sigur Mirjam Johannesen.



Avleiðingarnar av afturlatingini verða ovurhondsstórar. Børn, sum áður eru komin akutt á Barnaheimið, tí mamman ella pápin hava gloymt at heinta tað í vøggustovuni, ella tí tey av øðrum grundum eru svikin, kunnu ikki vera á Barnaheiminum longur enn tvær vikur framyvir, og tá mugu tey vera á deildini fyri størri børn.

- Barnaverndirnar, sum hava ábyrgdina av hesum skilinum, mugu so finna aðrar loysnir fyri hesi børnini, sigur Mirjam Johannesen.

Almanna- og heilsumálastýrið er kunnað um støðuna. Haðani eru komin boð um at siga starvsfólkunum á smábarnadeildini upp.

- Eg rokni ikki við, at myndugleikarnir eru greiðir yvir avleiðingarnar av, at smábarnadeildin letur aftur.

Virkandi leiðarin á Barnaheiminum sigur, at grundin til, at barnaverndir velja fosturfamiljur heldur enn at lata børn á Barnaheimið, er, at so er trupulleikin loystur her og nú. At síggja til.

- Tá ið børn koma á Barnaheimið, krevja vit av barnaverndunum eitt áhaldandi og framhaldandi samstarv. Hetta kann tykjast sum ein ov stór byrða fyri barnaverndirnar, sum framman undan hava nógv mál at arbeiða við.

Mirjam Johannesen veit frá barnaverndum kring landið, sum eru illa við um støðuna og sum tíðum venda sær til barnaheimið eftir hjálp.

- Fleiri siga, at tær ikki kunna gera arbeiðið nóg gott, um smábarnadeildin letur aftur. Men vit kunnu ikki siga annað, at vit fáa ikki longur hjálpt teimum longur.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Hava biðið um umbering fyri Torbjørn Jacobsen

**Mentamálastýrið hevur roynt at slætta sjógvin fyri at fáa betri samstarv við skúlarnar kring landið**

SLÆTTA SJÓGV
*Áki Bertholdsen*

Mentamálastýrið hevur nú biðið um umbering fyri atburðin hjá Torbirni Jacobsen, tá ið hann var landsstýrismaður.

Tað var á tí tiltikna fundinum ímillum Torbjørn Jacobsen og Vestmanna Skúla, at landsstýrismaðurin vísti slíkan atburð, at Mentamálastýrið heldur at tað sømir seg at biðja um umbering.

Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Lærarafelagnum, sigur, at tað var nú ein dagin herfyri, at Mentamálastýrið kallaði Lærarafelagið til fundar.

– Á tí fundinum vóiru øll tey ovastu embætisfólkini, sum høvdu við fólkaskúlan at gera. Og á tí fundinum fingu vit eina formliga umbering fyri atburðin hjá Torbirni Jacobsen á fundinum við leiðsluna í Vestmanna Skúla.

Nú eru fólk ójøvn á málið um, hvat hendi á fundinum. Men tað er í øllum førum greitt, at orðadrátturin var ógvuliga harðligur og har lá leikluturin hjá landsstýrismanninum ikki eftir.

– Tá ið vit fingu umberingina, boðaðu embætisfólkini í Mentamálastýrinum frá, at ætlanin var ongantíð, at fundurin skuldi ganga, sum hann gekk. Tey søgdu eisini, at tey fegin vildu slætta sjógvin aftur og royna at fáa betri samstarv við skúlarnar kring landið.

Hendan umberingin er síðani kunngjørd øllum limunum í Lærarafelagnum umvegis álitisfólkini.

Elsa Birgitta Petersen sigur, at í næstum verður ein fundur afturat ímillum leiðsluna í Vestmanna Skúla, Mentamálastýrið og umborð fyri Lærarafelagið.

Hon sigur, at tað var ikki so nógv Føroya Lærarafelag, sum hevur brúk fyri eini umbering. Mentamálastýrið skuldi heldur biðið leiðsluna og álitisfólkið í Vestmanna Skúla um umbering og tað vænta vit eisini, at hon fær á fundinum, sum verður við Mentamálastýrið.



*– Vit hava nú fingið eina formliga umbering frá Mentamálastýrinum fyri atburðin hjá Tobirni Jacobsen, tá ið hann var landsstýrismaður. Eg vænti ikki, at vit nakrantíð koma at vera fyri slíkum aftur, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Lærarafelagnum*

Formaðurin í Lærarafelagnum sigur, at eftir handan vanlukkuliga fundin ímillum Vestmanna Skúla og Mentamálastýrið, er tað gjørt av, at Lærarafelagið skal altíð vera við, tá ið skúlafólk fara á fund við Mentamálastýrið.

–Eftir tað, sum hendi á fundinum imillum Vestmanna Skúla og Mentamálastýrið, fara vit ikki aftur at senda skúlafólk einsamøll á fund við Mentamálastýrið, í hvussu so er ikki fyribils, sigur hon.

Men so leggur hon afturat, at hon er vís í, at nakað tílíkt fer aldrin nakrantíð at vera teimum fyri aftur.

# 8 nýggjar klippigentur

**Átta hárfríðkunarlærlingar stóðu sveinaroyndina á Tekniska skúla týsdagin**

KLIPPING
*Jústinus Eidesgaard*

Tað var ein stórur dagur hjá teimum átta lærlingunum, tá tær týsdagin høvdu verið til seinastu royndir sínar í hárfríðkunaryrkinum. 60 skúlavikur, sum ivaleyst eisini hava verið stuttligar, men sum tíðum hava verið strævnar, eru nú at enda komnar, so tað var skilligt, at sjampanjupropparnir fingu frítt at fara, tá boðini komu um, at tær allar høvdu staðið royndina.

## Sjónvarpið var við

Hóast ein sveinaroynd í sjálvum sær er nakað serligt, so hevði royndin hjá hesum átta nakað heilt serligt yvir sær. Sjónvarpið hevði nevnliga biðið um loyvi at vera við til royndina, so samstundis sum litir, uppsetingar og purlur skuldu fáast í rættlag, noyddust genturnar eisini at finna seg í sjónvarpstólinum, sum áhaldandi peikaði móti teimum teir báðar dagarnar, sum royndin vardi. Gongst eftir ætlanini, verður talan um eina sending, sum ætlandi verður at síggja eina ferð í heyst.

Tí kendist lættin kanska eisini eyka stórur, tá tað um fimm-tíðina endiliga var greitt, at nú var alt leyst og liðugt. Tó so. Hjá teimum flestu er enn galdandi, at seinasti parturin av lærutíðini skal fáast frá hondini, men ivaleyst mann hesin parturin fella teimum lættari, enn tá tankarnir samstundis sveima um próvtøkur av alskyns slag.



*Seinasta royndin var í uppsetan, og á myndini síggjast snotuliga módellini, sum tær átta høvdu gjørt til, so talan eins væl kundi verið um eina stóra mótasýning*

Tær sum stóðu sveinaroyndina hesa ferð vóru Anngerð Hammer úr Hvalba (lærupláss, Hárrøktan í Øravík), Angeli Tindskarð, Tórshavn (hjá Ásu, Tórshavn), Bryngerð Ejdesgaard, Klaksvík (Salong Maria, Argir), Beinta Hansen, Toftir (Salong Katrin, Toftir), Lissi Mouritsen, Tórshavn (Salong Bylgjan, Argir), Marjun Hansen, Skálavík (Sax o'føn, Tórshavn), Paula McGavin, Tórshavn (Kvilt Hárfríðkan, Tórshavn) og Ragnhild Guðjónsson, Tórshavn (Salong Tóta, Tórshavn). Høvuðslærar á skeiðnum vóru Lis Helgadóttir og Sunneva Thorsteinsson.

Týskvøldið var so lítil samkoma uppi á skúlaheiminum, har tær átta fingu handað prógvini fyri skúlaskeiðið og sveinaroyndina, og tá lærutíðin er liðug, fáa tær so endaliga sveinabrævið.